DAGSINS MEINING

Øll eygu vend móti Hess

Komandi mánaðir verða rættiliga avgerandi fyri oljuleitingina við Føroyar. Tá fer The Faroes Partnership við Amerada Hess á odda at bora ein týðandi avmarkingar- og metingarbrunn í bretska partinum av Atlantsmótinum skamt frá okkara marki. Hesin brunnur kann avdúka, um fundið, sum varð gjørd á landgrunninum í fjør, er nóg stórt, til at tað kann løna seg at byggja út og taka oljuna upp. Sum skilst kann ganga báðar vegir. Men tað er greitt, at henda eina boringin nýtist ikki at geva endaliga svarið, um fundið hjá Hess á landgrunninum, er lønandi. Tað skulu møguliga fleiri boringar til fyri at kunna svara tí.

Verður boringin í lisensinum 204/16 í bretskum øki ein fulltreffari tvs. vísir hon, at oljufeltið, sum Hess fann í fjør, er so stórt, sum vónir og illgruni eru um, so kann hetta sjálvandi fáa alstóran týdning fyri føroyaøkið og her ikki minst fyri vinnuna á landi í Føroyum, sum so smátt hevur gjørt seg út til nýggju avbjóðingina. Hetta kann koma at fáa avleiðingar fyri tann rikna politikkin á nógvum økjum. Men gongur tað hinvegin og vísa kanningarnar, at talan er ikki um eitt lønandi fund antin tí at tað er ikki nóg stórt ella tí, at umstøðurnar at fáa oljuna upp ikki eru tær røttu, so kann hetta eisini koma at tarna leitingini á føroyaøkinum.

Tað er greitt, at tríggir brunnar boraðir í einum nýggjum øki geva ikki nakað endaligt svar, men er einki lønandi fund fer tað heilt givið at gera, at oljufeløgini fara ikki at raðfesta Føroyaøkið eins høgt sum tey hava gjørt tað higartil. Hinvegin hava oljufeløgini bundið seg til at bora fleiri brunnar, og tær boringarnar verða so næsta ár og í 2004 og 5. Her er talan um fimm brunnar aftrat.

Nú eiga vit sjálvandi ikki at fella í fátt, tí talan er bert um eina byrjan. T.d. vita vit als ikki, hvat stóra økið undir basaltinum kann goyma. Og hyggja vit at gongdini vestan fyri Hetland, so vóru boraðir meira enn 70 brunnar har, áðrenn lønandi fund varð gjørt. So hetta vísir, at vit mugu gera okkum út við toli. At tað kemur illa við hjá vinnuni, sum kanska hevur verið í so bjartskygd, er so nakað vit mugu læra okkum at liva við. Tí er tað eisini so týdningarmikið, at hvørki vinna ella samfelag í verandi støðu gera størri íløgur í eina komandi oljuvinnu, men heldur fara varðliga fram og fyribils hava hesa vinnu sum eitt íkast. At tær brynja seg út og førleikamenna seg til hesa nýggju vinnu er tó ein sjálvfylgja, men soleingi einki lønandi oljufund er gjørt eigur alt samfelagið at vísa størsta varsemi og hógv.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Bygging á Berjabrekku

Jógvan Arge
býráðslimur fyri Tjóðveldisflokkin

Skyldi helst eina frágreiðing um, hvat hendi í byggi- og býarskipanarnevndini í farnu viku um ætlaðu íbúðabyggingina á Berjabrekku. Kann siga so mikið:

Tekniska umsitingin hjá Tórshavnar Býráð arbeiðir við málinum um tað stóra stykkið, sum kommunan hevur selt Sp/f Høgna Mikkelsen at byggja íbúðir á á Berjabrekku.

Grannarnir omanfyri hava gjørt vart við, at byggiætlanin fevnir eisini um jørð, sum er avløgd til onnur endamál enn íbúðabygging.

Á nevndarfundinum mánadagin varð mær greitt frá, at tey fólk, sum bygdu tey niðastu húsini undir Brúnni, á sinni fingu at vita, at fríøki var niðanfyri hjá teimum, og sambært hesum upplýsingum høvdu tey lagt sína bygging til rættis. Hetta økið hevur kommunan herfyri latið til íbúðabygging.

Nú sigur umsitingin, at ein gomul ætlan, sum tey hava leitað fram, váttar, at hesin ovasti parturin av stykkinum, sum kommunan hevur selt Sp/f Høgna Mikkelsen, upprunaliga ikki hevur verið ætlaður til bygging.

Um ætlaðu byggingina yvir móti Býlingshúsinum undir Brúnni varð upplýst, at ein partur av økinum, sum nú var ætlaður til íbúðabygging, hoyrir til Býlingshúsið, men tó ikki alt økið kring spælihúsini, sum har eru bygd.

Upplýst varð, at tekniska umsitingin nú tingast við Sp/f Høgna Mikkelsen um at broyta støðumyndina, so fyrilit verður víst teimum ásetingum, sum eru galdandi á økinum.

Í roynd og veru var málið tikið av dagsskránni fyri fundin í byggi- og býarskipanarnevndini, sum undirritaði hevði kravt tað fyri, eftir ein fund í samgonguni, men tað eydnaðist kortini at fáa hesar upplýsingar.

Rokni avgjørt við, at málið kemur fyri aftur í nevndini sum skjótast, so høvi verður til at fylgja við, hvat hendir, tí málið hevur stóran áhuga bæði í býráðnum og millum manna.

Á hesum sinni fekk eg onki at vita um spurningin um møguligt samanfall millum tað stóra stykkið, sum er selt Sjálvsognarstovninum hjá kommununi og Húsalánsgrunninum, og parkeringspláss og veg á núverandi Berjabrekku.

Við felagnum Javna birtist eitt ljós

Henry Jarnskor



»Eingin kennir mein í annans bein«. Flest okkara hava eygu og oyru, ið geva okkum fatan av førleika og umstøðum hjá øðrum, eisini tá vit møta einum við breki.

Vit øvunda grannanum, tá hesin er betri fyri enn vit eru, grenja og gevast ilt av okkum um órættvísi og stættarmun, men koma vit í samband við ein brekaðan av einum hvørjum slag, so takka og prísa vit innantanna fyri, at tað ikki eru vit ella nakar av okkara, ið er raktur av slíkari óeydnu.

Hvussu ofta hoyra vit ikki orðini: »eingin fer illa av, at ein annar fer væl?«

Hugsið eitt sindur. Hvat liggur aftanfyri hesi orð?

Er hetta annað enn ein sjálvglað undanførsla fyri einki at gera, uttan so at tað er til fyrimuns fyri ein sjálvan?

Tit avvarðandi av brekaðum gera eitt megnar ósjálvsøkið arbeiði. So stórt at nógv tykkara eru niðurkoyrd og niðurpínd. Kortini liggur so ómetaliga nógv á láni innan øll økir, ið hava við brekað fólk at gera. Hví? Ja hví?

Svarið er stutt og greitt, at tey, ið ráða fyri borgum, brúka alla orku teirra til at »fara væl«, tí tit fara ikki verri fyri tí. Tit eru frammanundan so illa fyri, at tit kunnu ikki »fara illa«.

Soleiðis síggi eg próvførsluna frá føroyska vælferðarsamfelagnum árið 2002.

Fatan er nakað, ið verður lært á hægri læristovnum. Góðsemi og næstakærleiki er romantiskur lættisoppalesnaður, ið ikki hóska seg hjá røttum framfýsnum samfelagsstuðlum. Tað ræður um at raðfesta, og at raðfesta rætt, soleiðis at samfelagshjólini rulla við røttu ferðini. Fatanin er har, men kenslurnar mangla. Tí er so illa statt, sum tað er.

Við felagnum Javna birtist eitt ljós, og tit, ið hava mynda felagið, øll hesi árini, hava syrgt fyri, at ljósið allatíðina hevur verið at sæð í myrkrinum. Fyri hetta arbeiði tykkara, eiga tit størstu tøkk uppiborna. Vit noyðast at sanna, at Javni er álitið og beta amboðið hjá teim brekaðu fyri at vinna nakrar sjálvsagdar sømdir. Styrkja vit Javna styrkja vit harvið góðsemi og nesta kærleikan… og ljósið gerst bjartari.

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri:
Jan Müller jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri:
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Tíðindaleiðari:
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Myndamenn:
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin

Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

Føroya Myndakalendari komin



Føroya Myndakalendari 2003 er nú at fáa til keyps í sølubúðunum. Eins og undanfarin ár er hann prýddur við sera vøkrum litmyndum

MYNDAKALENDARI
Eirikur Lindenskov

Føroya Myndakalendari 2003 hjá Jákup Andreas Arge er nú útkomin. Hetta er 23. árið, at Frøoya Myndakalendari gevur út kalendaran, og aftur hesaferð mugu vit ásanna, at talan er um ein prýðiligan kalendara.

Litfagrar landslagsmyndir fangaðar av myndamanni við einum ótrúliga góðum eyga fyri slíkum. Forsíðumyndin sýnir okkum Mykines í føgrum summarveðri.

Myndakalendarin er av sonnum ein fragd fyri eyga. Allar myndirnar eru úr fuglaperspektivi, tiknar úr tyrlu. Hetta ger kalendaran ábyrgdaverdari, tí hóast motivini eru kend, so eru tey ikki kend úr hesum sjónarhorninum, sum vit ikki síggja dagliga.

Myndirnar fyri einstøku mánaðirnar fylgja árstíðini. Eitt nú eru ein vøkur kavamynd, har vit sýggja Viðoy við Viðareiði í baksýni fyri januarmánað. Oktobermyndin sýnir okkum býlingin undir Varða í Havn – eisini úr luftini, og har ber væl til hjá havnarfólki at kenna seg aftur. Í baksýni síggjast býlingarnir uppi í Hoyvík, Vatnaskørðum og Undir Brúnni. Maimánaður sýnir okkum Hestoynna í summarveðri, og augustmyndin er av fótbóltsdysti á Svangaskarði.

Til føroyingar og ferðandi

Myndakalendarin er eitt framúrskarandi amboð hjá ferðavinnuni. Her verða Føroyar vístar úr vakrasta sjónarhorni, og tað er einki at ivast í, at fremmandafólk tekkjast landi okkara, tá tey síggja slíkar vakrar myndir.

Tað er tó ikki bara ferðafólkini, sum fáa gleði av kalendaranum. Nógvir føroyingar uttanlands hava kalendaran hgangandi.

Men myndakalendarin verður eisini brúktur til annað. Á baksíðuni er sum vanligt ein rúgva av praktiskum upplýsingum um Føroyar, og tað skal sigast útgevaranum til rós, at teir bróka dagførdar upplýsingar. Teksturin er skrivaður bæði á enskum og donskum.

Eins og undanfarin ár er Føroya Myndakalendari 2003 prentaður í Íslandi. Prentþjónustan og Oddi í Reykjavík hava staðið fyri prentingini.

Nú summar er í dag

Tað náttúruvakra, góðvarna og romantiska spælir ein høvuðsleiklut í myndaevnunum, Erik Haagemann velur. Seinast í juni sýnir hann fram í Smiðjuni í Lítluvík

FRAMSÝNING
Turið Kjølbro



Í døgunum 29. juni til 7. juli sýnir Erik Haagemannn fram í Smiðjuni í Lítluvík í Havn. Framsýningin hevur fingið heitið "Nú summar er í dag". Við á framsýningini eru 23 oljumálningar, har meginparturin er føroysk myndaevni.

Erik Haagemann er hálvur føroyingur. Føroyska ættin er av Tvøroyri. Hann hevur málað í nógv ár og sýnt fram bæði Danmark og í Føroyum. Eitt nú hevur hann teknað til bók um stuttleikaparkina Tivoli. Umframt lesur hann listasøgu, sum eisini gevur honum íblástur til egna list.

Erik leggur seg eftir at einfaldgera myndaevnini, bæði viðvíkjandi geometriskum formum og litspæli, sum hann setir upp ímóti hvør øðrum. Tað náttúruvakra, tað góðvarna og tað romantiska spælir ein høvuðsleiklut í myndaevnunum, sum verða upplivaðir sum friðsælt huglag.

Framsýningin hjá Erik Haagemann letur upp 29. juni kl. 15 og opið er dagarnar millum kl. 14 og 19.

144.000 bøkur og 27.000 vitjandi

Føroysk bókaútgáva støðug. Samlaða talið av føroyskum bókum, síðani tann fyrsta kom í 1822, er 4169. Landsbókasavnið og heimasíðan hjá savninum verða enn sum áður væl vitjað

LANDSBÓKASAVNIÐ
Turið Kjølbro

Í ársfrágreiðingini fyri 2001 frá Føroya Landsbókasavni, sum júst er komin, stendur, at í fjør komu tilsamans 117 bøkur út í Føroyum. Talið svingar fitt frá ári til ár. Í 2000 komu 170 bøkur úr, í 1999 121 og í 1998 157 bøkur. Um árslok gjørdu fjølmiðlar væl burtur úr, at talið á útgávum var væl minni enn árið fyri. Sagt varð, at orsøkin var vantandi stuðul til bókaútgávu. Í viðtali við landsbókavørðin í apríl segði hann, at vit skulu ikki hefta okkum so nógv við, at talið á útgávum minkaði.

- Onkusvegna hava vit lyndi til at hugsa í nøgd heldur enn í dygd. Útgávutølini hava altíð svingað, vísti Martin Næs á.

Enn sum áður eru yrkisbókmentir og barnabøkur meginparturin av útgávunum. Í fjør ávikavist 48 og 41. Á óbundnum máli komu 12 bøkur, á bundnum 5, og skúla- og læribøkurnar vóru 11 í tali. Nógvar av útgávunum eru týðingar. Hetta er serliga galdandi viðvíkjandi barnabókum, har 34 av 41 vóru týðingar í fjør.

Í dag verða flestu bøkurnar, sum verða givnar út í Føroyum, prentaðar í Føroyum. Samlaða talið av føroyskum bókum, síðani tann fyrsta kom í 1822, er sostatt 4169. Tær 117 bøkur, sum komu í fjør, høvdu tilsamans 15795 blaðsíður og kostaðu tilsamans 18.083 krónur. Størsti útgevarin er Bókadeild Føroya Lærarafelags við 44 útgávum. Tær flestu bøkurnar koma út seint í árinum frá september til desember.

Í formæli í ársfrágreiðingini nemur landsbókavørðurin við nakrar hendingar, ið vóru í fjør. Árið var hendingarríkt á mangan hátt, sigur hann. Tað byrjaði longu ein av teimum fyrstu døgunum í januar, tá ið Landsbókasavnið fekk avhent eitt stórt og ómetaliga forvitnisligt og dýrabart handritasavn eftir Heðin Brú, rithøvund. Á ólavsøku skipaði Landsbókasavnið fyri størri handrita- og bókaframsýning í sambandi við, at 100 ár vóru liðin síðani Heðin Brú varð borin í heim. Seinastu tvey árini er bókasavnslógin vorðin endurskoðað. Í mai í fjør varð nýggj lóg samtykt. Hetta er tekin um, at tann politiski myndugleikin heldur tað vera neyðugt hjá samfelagnum at veita eina tænastu sum bókasavnstænastu. Sum alt annað í samfelagnum eru bókasøvnini eisini í eini áhaldandi broytingartíð, har runnið verður um kapp við tøkning og tíðina og tænastuna.

- Tøknini og tíðini mugu vit bara fylgja, men tænastuni mugu vit sjálv taka okkum av - og her liggur avbjóðingin í framtíðini, sigur Martin Næs í formælinum.

Bókatalið á Landsbókasavninum var við árslok 2001 um 144.000 bøkur. Umframt koma tíðarrit og mikrofilmir av føroyskum ávísum. Á Føroyadeildini vóru við árslok 2001 um 13.659 bøkur. Landsbókasavnið lænti í fjør 18.000 bøkur út. Av hesum vóru 1609 bøkur, greinir læntar ella útvegaðar uttanlands og 11 frá øðrum søvnum í Føroyum. Í fjør vóru 27.000 vitjandi á savninum og 19.782 vitjaðu heimasíðuna.